**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Merking av toski og øðrum fiskasløgum á Landgrunninum. Túrur nr. 1750**
**Tíðarskeið: 11 - 18/10 - 2017**

---

**Fólk frá HAV:** Marit Pedersen, Poul Vestergaard, Mourits Mohr Joensen, Regin Kristiansen og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, kanningarleiðari.

**Endamál:** Endmálið er at kanna ferðingarmynstrið hjá toski og øðrum fiski á føroyska landgrunninum.

**Eyka uppgávur:** Sum vanligt hevur verið í fleiri ár, vórðu nakrir smáfiskar (26) frá Mýlingsgrunninum latnir Umhvørvisstovuni til kanningar.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 100 mm meskum í brókaposanum. Vágslemmar. Breitlalongin er 60 m. Rockhopper grunnur. Til merkingina: merkipistól og merkir, mátibretti, vekt, kassar og slangur, klokka, skriviútgerð og teldur.

**Um túrin:** Fóru av Havnini hósdagin 12/10 kl. 11:10. Vegna vind av útsynningi byrjaðu vit at merkja eystanfyri tann dagin. Fríggjadagin var somikið nógvur vindur av útsynningi, at vit krokaðu eystan fyri Viðoy. Byrjaðu at merkja aftur eystanfyri leygarmorgunin og hildu kósina suðureftir. Sunnudagin merktu vit tosk vestan fyri Skúvoy, men fóru vestur á Bøin, tí streymurin var ov harður. Síðan merktu vit á Mýlingsgrunninum og fóru aftur eitt legg vestur á Bøin týsdagin. Tóku okkurt hál í Vágahavinum áðrenn vit fóru á Havnina. Vit landaður í Havn mikumorgunin kl. 7. Merkingarlistin er vístur í talvuni niðanfyri. Merktir vórðu tilsamans 1879 fiskar, tað mesta var toskur.

**Fyribilsúrslit:** Tað var væl at fáa av toski á flestu støðum. Vit merktu eisini hýsu og havtasku. Vit fingu 68 merktar toskar aftur; av teimum høvdu 49 verið í sjónum í eitt ár ella longri. Vøksturin var 5,7 cm um árið. Toskurin var óvanliga væl fyri, konditiónsfaktorurin (K) lá um 1,2.

| Øki | Havtaska | Hýsa | Toskur | Miðallongd | Miðal K |
|---|---|---|---|---|---|
| Á Mýlingsgrunni | 1 | 2 | 300 | 60.5 | 1.21 |
| Bøurin | 2 | 6 | 679 | 64.2 | 1.23 |
| Eystanfyri | 8 | 86 | 444 | 61.9 | 1.16 |
| Vestan fyri Skúvoy | 0 | 19 | 332 | 66.9 | 1.19 |
| Íalt | 11 | 113 | 1755 | 61.8 | 1.20 |

Tilsamans 1879 fiskar.

**Nær eru merkilistarnir lisnir inn á teldu:**
Merkilistin var liðugur 17. oktober.

Á Havstovuni 18. oktober 2017
Petur Steingrund – kanningarleiðari.